**Listafólkasamband Føroya**
Lützenstrøð 4, 100 Tórshavn
Føroyar
lisa@lisa.fo
www.lisa.fo
Tel. +298 220197

Juni 2026

# Skrivstovuhøli til leigu á Lützenstrøð

Listafólk kunnu leiga skrivstovuhøli í húsinum hjá Listafólkasambandi Føroya á Lützenstrøð 4 í Tórshavn. Hølið er ætlað limum í limafeløgunum hjá LISA.

Hølið er 10 $m^2$ og kostar 924,00 kr. um mánaðin.

Húsaleigan fevnir um atgongd til felagshøli við tekøki og fundarhøli við storskíggja, har pláss er til uml. 10 fólk. Harumframt er wifi, el og hiti íroknað leiguna.

Í løtuni leiga eisini onnur í húsinum, m.a. einstøk listafólk, limafeløg í LISA, Norrøna Felagið, Fjølrit og Mentanargrunnur Landsins.

Í umsóknini skal upplýsast:

- hvørjum limafelagi tú ert limur í
- stutt frágreiðing um títt virksemi
- grundgeving fyri hølistørvi
- hvussu leingi tú væntar at hava tørv á hølinum
- um tú ynskir at leiga einsamøll/einsamallur ella saman við arbeiðsfelaga

Leigumálið byrjar 1. juli 2026.

Bæði einstaklingar og felagsskapir kunnu søkja, men krav er um limaskap í einum undirfelagi hjá Listafólkasambandi Føroya.

Umsókn skal sendast til lisa@lisa.fo. Freistin at søkja er 20. juni 2026.

Nærri kunning fæst við at venda sær til LISA á telefon 220197.